# Námsfrøðingurin gjørdist lærari

**Tvøroyrar kommuna fekk sín vilja í málinum um leiðaran á Frítíðarskúlanum á Tvøroyri. Landsstýrismaðurin, Hans Pauli Strøm, góðtók mánadagin grundgevingina hjá kommununi fyri at seta læraran í starvið, hóast dagstovnalógin ásetur, at námsfrøðingurin átti starvið**

PEDAGOGMÁLIÐ Á TVØROYRI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Seinastu mongu vikurnar hevur Frítíðarskúlin á Tvøroyri fingið stóra rúmd í føroysku fjølmiðlunum*

*Mynd: Leivur Nygaard*

Raðsendingin um trætuna um leiðarastarvið á Frítíðarskúlanum á Tvøroyri endaði fyribils týsdagin.

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, boðaði mánadagin frá, at hann góðtekur grundgevingina hjá Tvøroyrar kommunu um at seta ein lærara sum leiðara á frítíðarskúlanum í Trongisvági heldur enn námsfrøðingin, hóast tað stendur í dagstovnalógini, at námsfrøðingurin átti at fingið starvið

Málið um leiðarastarvið á Tvøroyri hevur fingið stóra rúmd í fjølmiðlunum seinastu vikurnar, og vit gera her eina roynd at lýsa málið.

## Ivasom mannagongd

Málið um leiðarastarvið á Frítíðarskúlanum á Tvøroyri byrjaði 8. juli í ár, tá Tvøroyrar kommuna søkir í bløðunum eftir einum pedagogi ella námsfrøðingi til Frítíðarskúlan á Tvøroyri.

Sum sæst á síðuni er talan ikki um eina rúgvumikla lýsing. Í lýsingini stendur einki um, hvat starvið umfatar, hvør arbeiðstíðin verður ella í hvørjum lønarbólki, leiðarin á Frítíðarskúlanum verður løntur, hóast greiðar ásetingar eru um tað í í sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Tvær kvinnur søkja starvið. Onnur teirra er pedagogur, og hevur starvast á Frítíðarskúlanum á Tvøroyri seinastu trý árini, meðan hin hevur útbúgving sum lærari.

Tvøroyrar kommuna viðger umsóknirnar, og velir at seta læraran í starvið. Stutt eftir avgerðina hjá kommununi finst Føroya Pedagogfelag at starvssetanini. Felagið vísir á, at kommunan fremur lógarbrot við at seta læraran í starv, tí sambært grein 8 í dagstovnalógini er tað eitt krav, at ein pedagogur stendur á odda fyri frítíðarskúlum í Føroyum.

Pedagogfelagið vísir eisini á, at pedagogurin, sum ikki hevur fingið starvið, verður ongantíð biðin um at koma til setanarsamrøðu. Í brævinum, sum pedagogurin fær, stendur at starvið er sett øðrum umsøkjara, sum er betri skikkaður.

Grundgevingin er, at Tvøroyrar Kommuna metir, at tann, ið er sett, hevur drúgvari royndir við børnum í skúlaaldri og hevur relevanta útbúgving, sum í hesum føri kann líkastillast við útbúgvingina, sum pedagogurin hevur.

Kortini biður Tvøroyrar býráð óskikkaða pedagogin um at røkja leiðarastarvið fyrstu dagarnar, tí setti leiðarin á Frítíðarskúlanum er burturstødd, og kann ikki møta fyrr renn 25. august.

Pedagogfelagið vendir sær til Almanna- og heilsumálaráðið, og ger vart við óreglusemi í samband við setanina av læraranum í leiðarastarvið á frítíðarskúlanum.

Mitt í august mánaði fer málið á rull.

## Semjan

Føroya Pedagogfelag og Almanna- og heilsumálaráðið eru seinast í august og fyrst í september mánaði í drúgvum brævaskifti um setanina av leiðaranum á frítíðarskúlanum.

3. september ger Almanna- og heilsumálaráðið Tvøroyrar kommunu greitt, at hon verður noydd taka setanina av læraranum aftur, og lýsa leiðarastarvið leyst aftur, tí kommunan hevur brotið dagstovnalógina.

Hesi viðurskifti skulu fáast í rættlag áðrenn 10. september. Samstundis ynskir landsstýrismaðurin at hitta allar kommunustýrislimirnar á fundi, har hann ætlar at fáa eina loysn í málinum

Ger Tvøroyar kommuna ikki eftir harraboðum úr Almanna- og heilsumálaráðnum, hóttir Hans Pauli Strøm við at lata frítíðarskúlan aftur við fútaboði. Tvøroyrar Býráð ger einki við málið.

12. september eru Hans Pauli Strøm og tríggir býráðslimir úr Tvøroyar býráð á kreppufundi á Tvøroyri, og finna fram til eina semju í málinum.

Landsstýrismaðurin biður Tvøroyrar býráð taka neyðug stig til at fáa viðurskiftini í lagi í samband við setanina, og bindur seg samstundis til at taka stig til at broyta grein 8 í dagstovnalógini, sum ásetur førleikakrøvini hjá leiðarum á frítíðarskúlum.

Tvøroyrar býráð velir eftir fundin at taka setanina av læraranum aftur, men leiðarastarvið verður ongantíð lýst leyst aftur. Kommunan velir hinvegin at seta sama lærara sum fyribils leiðara á frítíðarskúlanum, og tá tala Føroya Pedagogfelag og Almanna- og heilsumálaráðið at aftur.

Hans Pauli Strøm krevur at fáa at fáa ein haldgóða grundgeving frá Tvøroyrar kommunu, hví námsfrøðingurin ikki verður settur í starvið, tá kommunan hevur ógildað setanina av læraranum, og námsfrøðingurin tí er einasti umsøkjarin.

Tvøroyrar Býráð verður álagt at viðgera umsóknina hjá pedagoginum av nýggjum, har kommunan við grundarlagi í einari konkretari meting tekur avgerð um námsfrøðingurin kann setast í starvið. Tvøroyrar Býráð kemur síðani við einari grundgeving, men hendan grundgevingin verður ikki góðtikin.

Landsstýrismaðurin setur enn einaferð knívin á barkan á kommununi, og hóttir við at lata Frítíðarskúlan aftur, um Tvøroyrar kommuna ikki kemur við eini frágreiðing.

## Lærarin settur

30. september fær Almanna- og heilsumálaráðið grundgevingina hjá Tvøroyrar kommunu um hví pedagogurin ikki er settur í starvið sum leiðari.

Hans Pauli Strøm og Almanna- og heilsumálaráðið siga seg góðtaka grundgevingina hjá Tvøroyrar kommunu, tí landsstýrismaðurin heldur, at Tvøroyrar býráð dugir betur enn Almanna- og heilsumálaráði at gera av, hvørt pedagogurin er skikkaður ella ei.

Hóast áhaldandi trýst frá Føroya Pedagogfelag er niðurstøðan hon, at læraran røkir starvið sum fyribilsleiðari á frítíðarskúlanum til summarsteðgin 2005.

**Pedagogur til frítíðarskúla**

Fyri leiðaran í farloyvi verður søkt eftir pedagogi til Frítíðarskúlan á Tvøroyri í eitt ár frá 15. august.

Umsóknir skulu vera Tvøroyrar býráð – sosialu nevnd – í hendi seinast 1. august.

**Tvøroyrar býráð**

*8 juli byrjaði málið um leiðaran á Frítíðarskúlanum á Tvøroyri. Her er lýsingin, sum Tvøroyrar býráð setti í bløðini.*



# Ein politiskur trupulleiki

**Landsstýrismaðurin, Hans Pauli Strøm ásannar, at málið um Frítíðarskúlan á Tvøroyri er eitt politiskt trupulleiki fyri seg. Hann er kortini ikki bangin fyri niðurstøðuni hjá Løgtingsins Umboðsmanni í málinum, tí formligu viðurskiftini eru í lagi, sum hann málber**

PEDAGOGMÁLIÐ Á TVØROYRI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Tað er ongantíð hugaligt at vera ósamdur og í stríði við fakfeløgini, og tað ein politiskur trupulleiki, eisini fyri meg persónliga, og tað eri eg keddur av, vísir landsstýrismaðurin á.*

*Jens Kristian Vang*

– Hetta er eitt ógvuliga keðiligt mál , sum eg fyri alt í verðini vildi verið fyriuttan. Málið er avgjørt ikki nakað, sum eg eri fegin um -heldur tvørtur ímóti.

Landsstýrismaðurin, Hans Pauli Strøm, ásannar, at trætan um setanina av leiðaranum á Frítíðarskúlanum á Tvøroyri er ein politiskur trupulleiki.

–Tað er ongantíð hugaligt at vera ósamdur og í stríði við fakfeløgini, og tað er ein politiskur trupulleiki, eisini fyri meg persónliga, og tað eri eg keddur av, vísir landsstýrismaðurin á.

Framferðarhátturin hjá Hans Paula Strøm og Almanna- og heilsumálaráðnum í málinum um leiðaran á Frítíðarskúlanum á Tvøroyri hevur fingið øði í Føroya Pedagogfelag, sum hevur kært landsstýrismannin fyri Løgtingsins Umboðsmann. Hans Pauli Strøm ber ikki stórvegis ótta fyri niðurstøðuni hjá Umboðsmanninum

–Nei eg eri ikki bangin fyri niðurstøðuni, tí eg eri sannførdur um, at vit hava formligu viðurskiftini í lagi, sigur landsstýrismaðurin.

## Semjan

12. september varð sonevnda semjan gjørd millum Tvøroyrar býráð og landsstýrismannin í almanna og heilsumálum í málinum um leiðaran á Frítíðarskúlanum.

Spurdur, hvør bakgrundin var fyri semjuni, svarar Hans Pauli Strøm, at hann fyrst og fremst ynskti at gera Tvøroyrar býráð greitt, hvat dagstovnalógin kravdi í samband við setanina av leiðararnum á Frítíðarskúlanum.

–Umframt at finna eina semju, so vit kundu sleppa undan einum stríði, var ætlanin eisini við fundinum at kunna býráðið um ætlaninar at endurskoða dagstovnalógina. Ein av mongu broytingunum var millum annað grein átta, sum umfatar førleikakrøv hjá leiðarum á frítíðarskúlum.

Á fundinum millum Tvøroyrar býráð og landsstýrismannin koma partarnir fram til eina semju. Býraðið bindur seg til at fáa viðurskiftini í samband við setanina í rættlag, meðan landsstýrismaður sigur seg vilja taka stig til at broyta dagstovnalógina.

*Hví bindur landsstýrismaðurin seg í eini avtalu við einstaka kommunu at broyta dagstovanlógina?*

- Eg haldi ikki, tú kanst siga, at eg bindi meg til nakað. Eg kunnaði bert kommununi um, at ætlanir eru um at broyta dagstovnalógina. Hetta varð gjørt fyri, at kommunna kundi vísa størri forstáilsi fyri avgerðini hjá mær, har eg álegði teimum at taka setanina aftur, svarar Hans Pauli Strøm.

Á fundinum millum Tvøroyrar býráð og landsstýrismannin eru bert fýra mans umboðaðir. Hans Pauli Strøm umboðaði einsamallur Almanna- og heilsumálaráðið, og Kristin Michelsen, Sverre Midjord og Heri Mortensen vóru fyri Tvøroyrar býráð

*Hví hevði tú ikki ein embætismann ella skrivara frá ráðnum við á fundinum?*

- Eg fór í Suðuroynni øðrum ørindum (Umrøddi studentaskúlan í Vági, blðm). Sæð í bakaspeglinum skuldi eg havt fólk frá ráðnum við mær, tað var kanska býtt gjørt av mær.

*Hví vóru bert tríggir býráðslimir á fundinum?*

- Eg fekk at vita, at tað er sosiala nevnd á Tvøroyrar býráð, sum fremur setanina, og tí var bara hon umboðað.

## Skiftir ham

Í málinum um setanina av leiðaranum í Frítíðarskúlanum hevur Hans Pauli Strøm fleiri ferðir havt knívin á barkan hjá Tvøroyrar kommunu, um hon ikki tók setanina av læraranum. Kortini gekk landsstýrismaðurin valinum hjá Tvøroyrar kommunu á møti, tá hann mánadagin staðfesti, at lærararin verður fyribilsleiðari á Frítíðarskúlanum hetta skúlaárið út.

*Hví hevur landsstýrismaðurin brádliga skift støðu?*

- Kommunan fekk at vita, at hon skuldi viðgera málið av nýggjum. Vit gjørdu kommununi greitt, at tað kundu bert verða tvey úrslit av tí viðgerðini. Antin varð námsfrøðingurin settur í starvið ella skuldi kommununa eftir fyrisitingarlógini grundgeva, hví hon ikki setti námsfrøðingin. Vit viðgjørdu svarið hjá kommununu , og vit mettu, at svarið lýkur formliga øll krøv, sum vit settu teimum.

*Var grundgevingin so góð, at tit sum eftirlitsmyndugleiki kundu víkja frá dagstovnalógini?*

-Í svarinum leggja vit dent á, at vit bert eru eftirlitsmyndugleiki á økinum, sum skal halda eyga við, at tað formella grundarlagi er í ordan. Tað er ikki okkara uppgávuna at gera av um ein grundgeving er betri enn ein onnur, men um lýkur hon formellu krøvini, og tað mettu vit, at kommunan gjørdi í hesum føri.

*Er tað ikki eitt formelt krav, at dagstovnalógin verður hildin?*

- Jú, men í hesum førið skal eftirlitsmyndugleikin syrgja fyri. at tey formellu viðurskiftini eru i lagi, og grundgevingin hjá kommununi verður mett sambært fyrisitingarlógin at lúka krøvini.

# Býráðið brýtur lógina

**Fyrrverandi borgarstjórin á Tvøroyri, Finnleif Guttesen, ivast ikki í, at Tvøroyrar býráð brýtur dagstovnalógina við at seta læraran í starv sum leiðara á Frítíðarskúlanum**

PEDAGOGMÁLIÐ Á TVØROYRI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Hans Pauli skuldi fyri langari tíð síðan skorið ígjøgnum í málinum, og sett býráðið upp á pláss, tí kommunan brýtir eftir míni sannføring heilt greitt lógina, tá hon setir lærararan- og ikki pedagogin í starv.

Finnleif Guttesen er fyrrverandi borgarstjóri á Tvøroyri, og hann ivast ikki í, at Tvøroyrar býráð er farið skeivt fram í málinum um setanina av leiðaranum á Frítíðarskúlanum á Tvøroyri.

Í Tvøroyrar kommunu eru í alt fimm býráðslimir í meirilutanum, og Finnleif Guttesen er einasti samgongulimur, ið hevur verið ímóti setanini av læraranum sum leiðara á Frítíðarskúlanum

Borgarstjórin Kristin Michelsen, Sverre Midjord, Heri Mortensen og Pauli Einarsson umboða meirilutan

## Eingin fundarboð

12. september var landsstýrið á fundi við Tvøroyrar býráð um leiðarastarvið á Frítíðarskúlanum, men bert tríggir býráðslimir fingu boð til fundin. Landsstýrismaðurin var á fundi við borgarstjóran, Kristin Michelsen, Sverra Midjord og Heri Mortensen, meðan hinir báðir limirnir í meirilutanum als ikki fingu boð.

– Allir býráðslimir fingu bræv frá Almanna- og heilsumálaráðnum um, at ráðið ynskti ein fund. Vit fingu kortini ongantíð nøkur fundarboð frá kommununi, sigur Finnleif Guttesen.

*Hvør er orsøkin til tað?*

- Eg gangi bara út frá, at orsøkin er, at eg eri ímóti setanini av læraranum, svarar fyrrverandi borgarstjórin

Í fleiri lesarabrøvum seinastu vikuran um frítíðarskúlan hevur verið róð framm undir, at setanin av læraranum sum leiðara av frítíðarskúlanum er politisk. Finnleif Guttesen sigur seg ikki vilja viðmerkja hetta uppáhald.

– Eg byggi mína støðu á fakligu krøvini til starvið, og tá er litið at ivast í, at pedagogurin átti at fingið starvið, sigur Finnleif Guttesen.